# Hvat er eitt álitisfólk

Føroya Pedagogfelag ynskir tær vælkomin sum álitisfólkaumboð. Hetta er ein spennandi og avbjóðandi uppgáva, sum tú fert at røkja í tvey ár í senn.

**Álitisfólk – § 12 í lógum felagsins,** 1. stk. Álitisfólk felagsins verða vald og skulu virka sambært álitisfólkaavtaluni ímillum felagið og Føroya Landsstýri. 2. stk. Val av álitisfólki og varaálitisfólki fer fram á stovninum í mars mánaði líka ár, og verða tey vald fyri eitt 2 ára skeið. Hvør stovnur velur 1 álitisfólk. Nevndin skal hava boð um úrslitið í seinasta lagið 2 vikur aftan á valið. 3. stk. Felagið skipar fyri minst 4 álitisfólkafundum um árið.

**Hvør kann veljast til álitisfólk - Álitisfólkaavtalan,** Stk. 2. Til álitisfólk kann bert veljast tann, ið hevur fulltíðarstarv og hevur arbeitt á viðkomandi deild í minst 1⁄2 ár. Undir serligum umstøðum kann tað gerast neyðugt at víkja frá hesum. Fyri hvørt álitisfólk skal veljast eitt varafólk.

**Hvat er eitt álitisumboð?** Eitt álitisumboð er bindiliður millum felagið og limin og er viðvirkandi til at gera felagið sjónligt. Eitt álitisumboð hevur ein týdningarmiklan leiklut í at tryggja, at arbeiðsviðurskiftini eru í lagi, og at røkja áhugamál felagsins á arbeiðsstaðnum. Eitt virkið álitisumboð fremur samhaldsfesti og styrki limanna millum.

**Hvat ger eitt álitisumboð?** Eitt álitisumboð røkir einamest fakfelagsslig áhugmál, kennir sáttmálan, svarar fyrispurningum, sendir fyrispurningar víðari til felagið og hevur eitt vakið eyga við arbeiðsviðurskiftunum. Eitt álitisumboð skal luttaka í setanarbólkum/ setanarsamrøðum.
Eitt álitisumboð skal tryggja røttu mannagongdina í uppsøgnum. Eitt álitisumboð skal luttaka í gongdini í truplum málum. Eitt álitisumboð skal hava møguleika at loysa uppgávurnar í arbeiðstíðini.

**Arbeiðsamboð hjá álitisumboðum.** Álitisfólkamappan, sáttmálar, lógir felagsins, almennur starvsfólkapolitikkur, álitisfólkafundir og heimasíðan: www.pedagogfelag.fo.
TÚ sum álitisumboð hevur ein týdningarmiklan leiklut. Tú kennir arbeiðsstaðið, viðurskiftini, leiðaran og tínar starvsfelagar, og tískil hevur tú „fingurin á pulsinum“. Felagið hevur tørv á tær!
Vit ynskja tætt samstarv, har tú sum álitisumboð fær regluliga kunning frá felagnum, og somuleiðis ynskja vit kunning frá tær, so at samskiftið gongur báðar vegir. Hava tit ynski ella hugskot til virksemi, sum t.d tilfar til Pedagogblaðið, uppskot til skeið/undirvísing, so vendið tykkum til felagið á tlf. 357576 ella á *pedagog@pedagogfelag.fo*